# Fimleikaframsýning í Klaksvík

**Tann stóra, árliga fimleikarframsýning in hjá Klaksvíkar Fimleikarafelag verður í KÍ høllini sunnudagin kl. 15.30**

FIMLEIKUR
*Solby A. Eliasen*

Umframt allar 260 luttakararnar hjá Fimleikarafelagnum, so verður eisini eitt gestalið við. Tað er eitt aerobiclið frá kvøldskúlanum, sum fer at sýna fram eina seriu. Annars verður bæði rútmiskur og reiðskaps-fimleikur á skránni. Luttakararnir eru flest allir í aldrinum frá 7 til 20 ár. Øll liðini hava vant eina seriu í árinum og ymiskt annað verður eisini á skránni. Í steðginum verður undirhald eins og undanfarin ár.

Kynsbýtið á luttakarunum er áleið líka hjá teimum yngstu, men so hvørt sum tey gerast eldri, minkar undirtøkan hjá dreingjunum.

– Tað er ikki gott at vita, hvat tað er, sum ger tað, men tað letur til, at áhugin dalar, tá teir koma upp um ein vissan aldur, verður sagt frá Fimleikarafelagnum. Dreingjunum dámar eisini best lop.

Annars verður sagt, at framsýningin í ár helst verður eitt sindur øðrvísi enn undanfarin ár, tí felagið hevur fingið fleiri ungar og nýggjar venjarar til hetta árið.

Men tað merkir ikki, at tørvurin á venjarum ikki er stórur. Frá felagnum siga tey, at teimum tørvar fleiri venjarar til komandi ár. Fimleikarárið byrjar í august og endar við framsýningini.

Hetta er fimta árið á rað, at Klaksvíkar Fimleikarafelag hevur framsýning og hevur undirtøkan verið avbera góð hvørja ferð. Høllin plagar at vera stúgvandi full av fólki.



*Klaksvíkar Fimleikarafelag hevur framsýning í KÍ høllini sunnudagin kl.15.30*

### 1. Deild menn

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 8 | 5 | - | 0 | - | 3 | 626 | 530 | 96 | 19 |
| 2 StÍF | 7 | 4 | - | 2 | - | 1 | 541 | 475 | 66 | 19 |
| 3 Neistin | 9 | 4 | - | 1 | - | 4 | 598 | 565 | 33 | 18 |
| 4 Kyndil | 8 | 5 | - | 2 | - | 1 | 548 | 530 | 18 | 18 |
| 5 KÍF | 8 | 2 | - | 2 | - | 4 | 537 | 557 | -20 | 11 |
| 6 H71 | 8 | 4 | - | 0 | - | 4 | 517 | 585 | -68 | 11 |
| 7 Tjaldur | 8 | 0 | - | 1 | - | 7 | 498 | 623 | -125 | 4 |

**Máltindurin:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Dragisa Stojovic | Tjaldur | 183 | (17) |
| Damir Oros | KÍF | 162 | (34) |
| Sveinur Justinussen | StÍF | 137 | (20) |
| Halgir D. Olesen | H71 | 135 | (5) |
| Áki Olsen | VÍF | 127 | (9) |
| Morgan Knezevic | Neistin | 127 | (26) |
| Jacob Jónsson | Kyndil | 118 | (7) |
| Áki Mørk | Neistin | 112 | (26) |
| Ingi Olsen | VÍF | 109 | (22) |
| Finnur Hansson | Kyndil | 96 | (13) |
| Costin Dumitrescu | StÍF | 92 | (22) |
| John Zachariasen | VÍF | 91 | |
| Hans Áki Dal-Christiansen | Kyndil | 89 | (27) |
| Niels Viggo Niclassen | H71 | 80 | 0 |
| Petur Martin Poulsen | KÍF | 77 | 0 |

Tjaldur-Neistin 27-35 (11-19):

# Neistamenn klárir til endaspurtin

**Við sigrinum á Tjaldri hevur Neistin lagt seg í bakhjólið hjá hinum trimum oddaliðunum, og við dystum móti øllum hesum, kann liðið nú fáa sína ávirkan í óvanliga javna oddastríðnum**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Einki er at ivast í, at teir bláu í Neistanum iðra seg grønar um vánaligu gongdina, sum rakti liðið fyrra partin av endaspælinum. Eftir at Neistin nú tykist hava fingið tamarhald á sínum niðurtúri, tykist túrurin nevnliga vera komin til hini liðini í deildini, og við eitt nú sigrum á H71 og Tjaldri – har fekk Neistin bara eitt stig – kundi liðið í dag sitið á oddasessinum í deildini.



*Tað tykist sum einasta málið hjá Tjaldri nú er er at fáa toppskjúttan í deildini, og í so máta gekst væl hjá Dragisa Stojovic, sum hesa ferð skeyt 14 mál*

### Eingin ivi

Farið er tó farið, og tað fáa teir í Neistanum ikki gjørt so nógv við, men nú tykist tað kortini, sum um liðið aftur er í ferð við at ota seg uppeftir stigatalvuni.

Mikukvøldið vitjaði Neistin hjá Tjaldri, sum langt síðani tykist vera farið í summarfrí, og har fyri tað mesta eingin pardón. Hóast tað ongan tíð var talan um nakað stórt rykk, har Neistin við nógvum málum á rað setti alt upp á pláss, so var talan kortini um sera sannførandi avrik. Frá fyrsta bríksli byrjaðu teir at toga frá Tjaldrinum, og tó at heimamenninir líka sum fingu loyvi at vera í dystinum, so sýndi máltalvan longu í hálvleikinum, at her mundi mest sum alt vera liðugt.

Og í seinna hálvleiki helt gongdin fyri tað mesta fram. Kanska tóku gestirnir tað dekan ov róligt onkra løtu, soleiðis at Tjaldur fekk minkað nakað um munin, men rættiliga spennandi gjørdist tað ongantíð. Tá munurin var minstur, hevði Tjaldur minkað niður í fýra mál, men tá Neistin so aftur setti ferð á seinastu løtuna, so var leyst og liðugt.

### Væl skal vilja til

Sum nevnt omanfyri, so tykist tað nú, sum um Neistin er um at fáa somu ferð á aftur, sum teir høvdu í grundspælinum. Kanska hava seinastu dystirnir verið ímóti mótstøðuliðum, sum á pappírinum teljast millum tey veikastu, men hinvegin eigur sálarligi týdningurin, sum tveir sigrar á rað kunnu hava fyri liðið, ikki at undirmetast. Og enn er kanska ikki ov seint hjá liðnum at fara eftir heiðursmerkjum, men so skal kortini ganga heilt væl. Liðið hevur tríggjar dystir eftir at leika, og eru hesir móti ávíkavist VÍF, StÍF og Kyndli!

Hjá Tjaldrinum tykist hinvegin ikki vera so nógv eftir at spæla um. Eftir eina lítla uppblóman tíðliga í endaspælinum, hava leikararnir nú fullkomuliga givið skarvin yvir. Hvørki vilji ella sál tykist vera í spælinum, og at botnsessurin longu nú er ein staðfesting, sigur eisini nakað um, hvussu illa árið hevur hilnast. Einasta málið hjá liðnum tykist í løtuni vera at fáa topskjúttan í deildini. Og sum Dragisa Stojovic tykist halda fram við stórskjóting sínari, so verður hetta helst eisini rokkið. Men so er eisini alt sagt.

### Dysturin í tølum

Tjaldur-Neistin 27-35 (11-19)
Málskjúttar:
Tjaldur: Dragisa Stojovic 14, Zoran Sarcevic 5, Tórur Thomsen 3, Arnfinn Langgaard 2(1), Ken Bærendsen 2, Uni Højgaard 1
Neistin: Morgan Knezevic 9(1), Ragnar Stakksund 6, Kári Mortensen 6, Áki Mørk 5, Dann Thorleifsson 4, Jón Ludvig 3, Helgi Justinussen 2
Brotskøst: Tjaldur 6, Neistin 1
Útvísingar: Tjaldur 3, Neistin 3
Diskvalifikatión: Tjaldur 1 (Beinleiðis reytt)
Dómarar úr Kyndli: Hannis Wardum & Eyðun Samuelsen.

# Meistarar úr Vestmanna

Um vikuskiftið varð endaumfarið í kappingini hjá gentum 12b leikt á Giljanesi. Neistin b, TB, VÍF b og Søljan høvdu leikt seg fram til umfarið, tá hesi endaðu á teimum báðum fremstu plássunum í sínum bólkum.

Og eftir at hesi fýra liðini soleiðis dystaðust innanhýsis, stóð greitt, at vestmenningar áttu besta liðið í kappingini. Søljan gjørdist nummar tvey, meðan Neistin og TB endaðu á ávíkavist triðja og fjórða plássinum.

**jm**



*Gentur 12 b hjá VÍF gjørdust føroyameistarar í kappingini fyri gentur 12b. Standandi frá vinstru eru tað Halla Durhuus, Vivian Petersen, Ragnhild á Heygum, Linda Davidsen, Angela Róadóttir, Sólja Torleifsson og Ioana Rápa, sum var venjari hjá liðnum. Húkandi eru tað Tóra Seloy, Agnas Olsen, Liljan Djurhuus, Ingilín Strøm, Oddvør Vang og Jóna Zachariasen*




# LANDMÁTARI

MUNIN

Ein av stóru avbjóðingunum hjá Munin er at víðka um og hækka tænastu- og góðskustigið innan uppmáting og avseting.
Í hesum sambandi verður søkt eftir landmátara.
Tað er ynskiligt, at tann, sum settur verður, kann byrja skjótast gjørligt.

**Uppgávurnar hjá Munin**
Munin átekur sær uppmáting og avseting fyri kundar eftir áheitan. Talan er um uppmáting av kloakk og vatni, avsetingar av vegum, uppmátingar av lendi osfr.
Uppgávurnar fevna eisini um klárgerð og hagreiðing av mátidata. T.d. gerð av tvørskurðum og hæddarkurvum.

Kundarnir eru kommunur, entreprenørar, arkitektar, almennir stovnar, privatir kundar o.l.
Til uppmáting og avseting verða nýtt Leica tól:
- *RTK/GPS 530*
- *TPS1103.* *(Einmansstýrd totalstatión)*

Til hagreiðing av data verður brúkt:
- *ESRI ArcView*
- *ESRI ArcInfo*
- *Hugin*

**Uppgávur hjá landmátaranum**
Uppgávur hjá landmátaranum verða m.a. at taka sær av:
- klárgerð og hagreiðing av mátidata.
- uppmáting við RTK/GPS 530
- uppmáting við TPS1103
- viðlíkahald av kortum

**Førleikakrøv**
Av okkara komandi starvsfelaga ynskja vit, at viðkomandi hevur:
- útbúgving í og/ella royndir við landmáting
- royndir við og kunnleika til GIS og CAD skipanir
- góðan tænastuhugburð
- góðan edv-kunnleika
- góð evni at arbeiða málrættað
- góðan røkjuskap
- góð samstarvsevni
- góð evni at orða seg bæði skrivliga og munnliga á føroyskum.

**Setanartreytir**
Talan er um eitt starv við spennandi avbjóðingum. Starvið gevur góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.
Samráðast kann um løn og arbeiðstíð.

**Umsóknir**
Umsókn við próvskjølum skal sendast til:
**Munin**
**Dr. Jakobsensgøta 18**
**FO-100 Tórshavn**
og skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 15. apríl 2003.
Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú seta teg í samband við Boga Jacobsen ella Róa Henriksen á tlf. 35 36 00 ella á e-post: munin@munin.fo.

SISERO 351800

*Sp/f Munin er eitt kt-virki við serkunnleika innan GIS*, skráseting og uppmáting.*
*Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni fevnir um ráðgeving innan GIS*, uppmáting og avseting av lutum og skráseting av data hoyrandi til hesar lutir.*
*Fyritøkan varð stovnað í november 1998 og svarar talið á starvsfólkum í dag til 3 fulltíðarstørv.*
**GIS - Geografisk Informatión Skipan - er skipan, ið fevnir um skráseting av geografiskum lutum og data hoyrandi til hesar lutir.*

TÁ KORTIÐ GER MUNIN ...






# 25 ára hátíðarhald

**Leikhúsið Gríma**
framførir
**Per Gúnt**
eftir Henrik Ibsen
leikstjórn Eyðun Johannessen
á Meiarínum

| | |
|---|---|
| **leygardagin** | **22. mars kl. 19.00 útselt** |
| **sunnudagin** | **23. mars kl. 18.00** |
| **týsdagin** | **25. mars kl. 19.30** |
| **mikudagin** | **26. mars kl. 19.30** |

Atgongumerki á kr. 125,- fáast á Kunningarstovuni og við dyrnar 1 tíma undan sýning. Bólkar uppá 10 ella fleir fáa 20% avsláttur.

# Bakaralærlingur

Hevur tú hug at útbúgva teg innan bakarayrkið, hava vit eitt læarupláss at søkja.

Bakaríið hjá Gunleivi hevur eina sera fjølbroytta framleiðslu innan alt bakarahandverk, har tú kemur at arbeiða í einum góðum arbeiðsumhvørvi saman við nógvum røskum fólki.

Bakaralæran er ein fjølbroytt útbúgving, ið gevur fleiri framtíðarmøguleikar. Nøkur velja at halda fram, har tey hava lært, meðan onnur vilja royna okkurt annað. Eitt nú starvast fleiri bakarar umborð á cruise-skipum, í oljuvinnuni og innan hotelvinnuna.

Bakaralæran gevur eisini møguleika fyri víðariútbúgving, til m.a. procesteknolog.

Lærutíðin til bakara er 4 ár, harav 35 vikur á tekniskum skúla.

Ætlanin er at tú skal byrja skjótast gjørligt, men vit bíða fegin eftir rætta viðkomandi.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til okkara og spyrja eftir Eli Andreasen.

BAKARÍIÐ HJÁ GUNLEIVI
**Tlf. 228838 ella 312161**

Sosialurin

Sosialurin -har tað hendir